# Claus skoraði aftur

Tað gongur væl hjá fyrrverandi føroyska landsliðsspælaranum Claus Bech Jørgensen í enska felagnum Blackpool, ið spælir í næstbestu deildini. Leygardagin spældi Blackpool ímóti Ipswich, og dysturin endaði 1-1. Í fyrra hálvleiki legði Claus Bech Jørgensen Blackpool á odda við einum góðum stútara, men í seinna hálvleiki javnaði Ipswich. Sløk 9000 fólk hugdu eftir dystinum. Blackpool er nummar 15 av 24 liðum í deildini.



# Kári Reynheim á Argjum

Gamla landsliðshetjan Kári Reynheim skal verða venjari í AB komandi kappingarár. AB hevur gjørt sáttmála við Kára Reynheim um at venja unglingarnar hjá felagnum. Umframt drúgvar royndir sum spælari, hevur Kári eisini roynt sum venjari áður, og hann hevur venjaraútbúgving úr Noregi. Kári hevur ikki verið virkin sum venjari seinnu árini, men nú hevur hann tikið eina nýggja avbjóðing á seg á Argjum.



*Eina løtu hevði StÍF gott tak á Lailu Jespersen og VB, men heimaliðið megnaði kortini at vinna ein rættiliga tryggan sigur*

*Mynd: Bjartur Joensen*

VB-StÍF 31-21 (14-12):

# VB á finalukós

**Tað stóð eitt sindur á, men í seinna hálvleiki sópaði VB allan iva til viks, tá StÍF vitjaði í Vági**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

VB var stórfavorittur móti StÍF sunnudagin, men tað tók sína tíð, áðrenn tær eisini prógvaðu hetta á vøllinum.

StÍF var nevnliga væl við allan fyrra hálvleik av dystinum. Eina løtu hildu tær eisini fast um eina leiðslu, sum spakuliga fór at líkjast einum púrasta óvæntaðum sigri.

Seinastu minuttirnar undan og fyrstu eftir steðgin koppaðu tó øllum á høvdinum. Hesa løtuna broyttist støðan frá 10-12 til 19-12, og so var ikki stórt meira, sum StÍF kundi gera.

VB fekk tá eisini tveitt nervarnar av sær, og við boðunum um stórsigurin hjá Stjørnuni í Havn fór lagið í VB-høllini fleiri stig rætta vegin.

Og tað hevur VB eisini alla orsøk til. Hóast talan enn er um javnstøðu við Neistan í dystinum um annað plássið, so hevur VB nú allar trumfirnar á hondini. Fyrst og fremst, tí tær enn eiga tveir heimadystir á móti Neistanum, og við heimahagtølum, sum enn ikki telja tap, hevur Neistin alla orsøk at óttast hesum uppgerðunum.

Hjá StÍF er tað fyrst og fremst botnurin, sum telur. Her hava tær enn fyrimun fram um VÍF, og tað tykist, sum verða tað dystirnir móti VÍF, sum gera av, hvussu botnurin á talvuni fer at síggja út. Eisini hóast strandakvinnur sjálvsagt eisini vóna, at tær onkursvegna kunnu toga stig til sín móti ovari støddu liðunum.

## FAKTA

**VB-StÍF 31-21 (14-12)**
10 min: 5-4
20 min: 7-10
40 min: 20-14
50 min: 26-16
**Málskjúttar:**
**VB:** Daiva Toumaite 13(4), Una Egilsdóttir 4, Kristina Holm 4, Monika Samuelsen 3, Miriam Michelsen 2, Theresa Joensen 2, Svava Vestergaard 1, Sára Samuelsen 1, Laila Jespersen 1
**StÍF:** Ninna K. Johansen 8(2), Rebekka Justinussen 5, Fríðrún Danielsen 2, Jóhanna í Króki 2, Ata Gregersen 1, Rósa Johansen 1, Sólfríð Christiansen 1, Malan Petersen 1
**Brotskøst:** VB 4, StÍF 3
**Útvísingar:** VB 1, StÍF 2
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen

Neistin-Stjørnan 17-32 (6-15):

# Søguligt Neista-tap

**Hóast Stjørnan ikki var fullmannað, megnaðu tær at geva Neistakvinnunum eitt tap, sum helst er tað størsta í søgni hjá felagnum**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tað vóru snøgt sagt fleiri klassar á muni, tá tey bæði fremstu liðini í Sunset-kappingini dystaðust sunnudagin*

*savnsmynd*

Lat tað bara verða sagt alt fyri eitt. Tað vóru fleiri klassar á muni, tá Stjørnan sunnudagin vant burtur úr Neistanum.

Hóast oddaliðið er nakað skert, nú hvørki Joan Midjord Djordjevic ella Lise Hjort Hansen eru tøkar, so megnaðu tær so ruddiliga at staðfesta sína støðu sum sterkasta liðið í landinum. Eisini hóast dysturin var á útivølli móti liðnum, sum undan dystinum var nummar tvey á talvuni.

### Punkteraðu

At sigurin gjørdist somikið stórur, hevði sjálvandi sínar orsøkir. Ein tann størsta var helst, at Neistin rættiliga skjótt fór í panikk, tá spælið eina løtu ikki gekk eftir vild. Seinastu 21 minuttirnar av fyrra hálvleiki skoraði Neistin bert tvær ferðir. Partvíst tí Stjørnan veruliga fekk verjuspælið at koyra hesa løtuna, men so sanniliga eisini, tí tær bláu ferð eftir ferð skutu upp á 70 ella 80% møguleikar, og tað vórðu tær so ruddiliga revsaðar fyri. Og tað mundi heldur ikki betra um støðuna, at Ása á Neystabø í løtuni er úti við skaða, og at Elin Staksund noyddist sama veg undir dystinum.

Hjá Stjørnuni var tað hugaligt hjá venjaranum at staðfesta, hvussu væl Durita Ljósstein fall inn á plássið sum miðspælari. Hetta er ikki hennara náttúrliga útgangsstøði, men við góðum fríspælingum inn á strikuni noyddi hon Neistan at verja nógv flatari, og tað gav veruliga pláss til sterku skjúttarnar hjá Stjørnuni.

### Ræðandi styrki

Líka mikið, um talan var um kollektivan niðurtúr hjá Neistanum, so prógvaði dysturin eina mest sum óhugnaliga styrki hjá meistarunum úr Stjørnuni. Kropsliga og tekniskt hava tær fleiri gear enn hini liðini, og tað gevur meistarunum eitt vápn, sum ikki bara kann verjast ella stríðast burtur. Og við skothóttanum av at kalla øllum plássum, er heldur ikki so sera einfalt hjá mótstøðuni at steðga teimum.

Sunnudagin royndi Neistin eina løtu við mansverju av Simonu, men eisini tann partin var Stjørnan fyrireikað uppá, og við fleiri flottum screeningum megnaðu tær kortini at geva pláss til toppskjúttan.

So enn sum áður er myndin, at Stjørnan er í einum flokki fyri seg. Og enn sum áður snýr spenningurin seg um, hvør skal fylgja teimum í finaluna. Ein dystur, sum VB nú tykist hava bestu kortini í.

## FAKTA

**Neistin-Stjørnan 17-32 (6-15)**
10 min: 4-5
20 min: 4-11
40 min: 10-20
50 min: 14-25
**Málskjúttar:**
**Neistin:** Nicoleta Radu Hansen 5(1), Unn Jónsdóttir Kragesteen 4, Rakul Magnussen 3(2), Ása Christiansen 2, Anja Heinadóttir 1, Marjun Danberg 1
**Dómarar:** Rúni Mohr & Ragnar Simonsen

# 18 met í Íslandi

**Suðuroyar Svimjifelag gjørdi eitt ordans hál í kapping í Íslandi**

SVIMJING

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Suðuroyar Svimjifelag tók lut í stórari kapping í Íslandi um vikuskiftið.

Og illa ber til at staðfesta annað, enn at úrslitini vóru framúr. 3 gull-, 3 silvur- og 4 fýra bronsumerki vóru við í viðførinum á heimferðini, og ikki færri enn 18 føroysk met vórðu sett.

Suðuroyar Svimjifelag hevur luttikið í stórari svimjikapping í Íslandi. Úrslitini tala fyri seg, svimjararnir gjørdu eitt ordans hál, og koma heim við 3 gull, 3 silvur, og 4 bronsu.

Metini, sum talan var um, síggjast á talvuni her á síðuni.

*Talan gjørdist um ikki færri enn 18 met, tá svimjarar úr Suðuroynni vóru til kapping í Reykjavík um vikuskiftið*

Metini

| Svimjari | Grein | Tíð | |
|---|---|---|---|
| Dánjal Martin Hofgaard | 50 m bringu | 0.32,36 | |
| Malan V. Bærendsen | 50 m bringu | 0.36,60 | |
| Shaila millum Garðarnar | 50 m firvald | 0.30,65 | |
| Pál Joensen | 1.500 m frí | 16.05,02 | |
| Dánjal Martin Hofgaard | 100 m bringu | 1.10,94 | |
| Malan V. Bærendsen | 100 m bringu | 1.22,39 | (fyrstu 100 av 200 m) |
| Malan V. Bærendsen | 200 m bringu | 2.51,39 | |
| Pál Joensen | 200 m firvald | 2.18,05 | |
| Shaila millum Garðarnar | 100 m firvald | 1.09,87 | |
| Malan V. Bærendsen | 100 m bringu | 1.21,07 | (fyrstu 100 av 200 m) |
| Malan V. Bærendsen | 200 m bringu | 2.50,31 | |
| Pál Joensen | 200 m firvald | 2.16,87 | |
| Malan V. Bærendsen | 100 m bringu | 1.19,73 | |
| Annmari Midjord | 200 m firvald | 3.02,62 | |
| Pál Joensen | 100 m firvald | 1.00,98 | |
| Pál Joensen | 200 m frí | 1.58,43 | |
| Malan V. Bærendsen | 100 m bringu | 1.19,39 | |
| Pál Joensen | 200 m frí | 1,56,56 | |